# Skála vinnur ongantíð í Runavík



*Her eru Rúni Rasmussen og Jonhard Fredriksberg í hornatøkum. NSÍ er favorittur til dystin heima ímóti Skála, men dystirnir ímillum liðini eru ofta sera javnir.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Einki uttan full úrtøka telur hjá NSÍ, sum støðugt rennur undan havnarmonnum**

NSÍ-SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Støðutalvan sigur, at heimaliðið er greiður favorittur, tá ið NSÍ í kommunuuppgerðini við Skálafjørðin fer at fáa vitjan av Skála. Favoritt leikluturin verður ikki minni av hagtalsliga veruleikanum, sum sigur, at í átta royndum higartil í bestu deildini hevur tað bara eydnast Skála eina ferð at fáa eitt stig í Runavík. Skálamenn eiga framvegis fyrsta sigurin á hinumegin fjørðin.

- Uttan mun til tølini so eru vit vísir í, at talan verður um tætta uppgerð. Talan er altíð um stórt stríð, tá ið vit spæla ímóti Skála, og eg havi skilt, at teir hava spart seg til júst henda dystin, sigur veteranmálverjin Jens Martin Knudsen:

- Higartil hava vit staðið okkum heilt væl á heimavølli, og sjálvandi fara vit eftir øllum stigunum. Vit hava virðing fyri skálamonnum, men vit ræðast teir ikki, sigur Jens Martin Knudsen.

Skála hevur tapt tveir teir seinastu dystirnar, og tað hevur ikki eydnast at skjóta mál ímóti KÍ og B36. Nú er oddaliðið á skránni.

- NSÍ á útivølli hevur altíð verið torfør avbjóðing hjá okkum, og soleiðis er tað eisini hesa ferð. Vit fara tó at royna at fáa stig burturúr, sigur Skála liðformaðurin Pauli G. Hansen, og tað er einki at ivast í, at skálamenn høvdu verið nøgdir, um tað hevði eydnast teimum at fingið eitt stig við tvørtur um fjørðin aftur.

formuladeildin

**Formula-deildin**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 18 | 13 | - | 2 | - | 3 | 33 | 15 | 18 | 41 |
| 2 | B36 | 18 | 12 | - | 4 | - | 2 | 34 | 11 | 23 | 40 |
| 3 | EB/S | 18 | 10 | - | 2 | - | 6 | 30 | 23 | 7 | 32 |
| 4 | HB | 18 | 9 | - | 3 | - | 6 | 37 | 24 | 13 | 30 |
| 5 | Skála | 18 | 7 | - | 2 | - | 9 | 20 | 27 | -7 | 23 |
| 6 | GÍ | 18 | 6 | - | 5 | - | 7 | 25 | 35 | -10 | 23 |
| 7 | B71 | 18 | 6 | - | 4 | - | 8 | 28 | 31 | -3 | 22 |
| 8 | KÍ | 18 | 6 | - | 3 | - | 9 | 26 | 26 | 0 | 21 |
| 9 | VB/S | 18 | 2 | - | 5 | - | 11 | 15 | 38 | -23 | 11 |
| 10 | AB | 18 | 2 | - | 4 | - | 12 | 19 | 37 | -18 | 10 |

**1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 19 | 18 | - | 1 | - | 0 | 66 | 13 | 53 | 55 |
| 2 | FSV04 | 19 | 13 | - | 3 | - | 3 | 38 | 23 | 15 | 42 |
| 3 | ÍF | 19 | 12 | - | 4 | - | 3 | 51 | 16 | 35 | 40 |
| 4 | LÍF | 19 | 9 | - | 1 | - | 9 | 40 | 31 | 9 | 28 |
| 5 | TB | 18 | 7 | - | 3 | - | 8 | 29 | 23 | 6 | 24 |
| 6 | HB | 19 | 7 | - | 2 | - | 10 | 30 | 40 | -10 | 23 |
| 7 | NSÍ | 19 | 7 | - | 1 | - | 11 | 35 | 48 | -13 | 22 |
| 8 | SÍ | 19 | 4 | - | 3 | - | 12 | 23 | 43 | -20 | 15 |
| 9 | KÍ | 19 | 4 | - | 2 | - | 13 | 19 | 48 | -29 | 14 |
| 10 | B36 | 18 | 2 | - | 2 | - | 14 | 17 | 63 | -46 | 8 |

## Vónbrotið skal vaskast burtur

**GÍ hevur seinastu árini havt gott tak á HB, sum skal vaska vónbrotið í steypakappingini burtur**

HB-GÍ
*Jóannes Hansen*

Í HB slikka teir sárini eftir stóra vónbrotið, sum tað var at tapa steypafinaluna. GÍ fer at vitja mánakvøldið, og tá verður kropsliga møðin frá intensivu og framúrspennandi steypafinaluni burtur.

Spurningurin er, hvussu tað verður við sinniligu møðini, sum sjálvandi tyngir serliga nógv eftir tapið.

- Vit hava staðið okkum væl ímóti HB bæði í fjør og í ár. Vit hava vunnið fýra av fimm teimum seinastu uppgerðunum, so vit trúgva upp á tað, hóast vit spæla á útivølli, og hóast HB spælararnir ivaleyst fara at verða serliga uppsettir, nú teir hava tapt steypafinaluna, heldur GÍ verjuspælarin Niclas Niclasen.

Í HB verður ásannað, at tað á ongan hátt var nóg gott í 1. hálvleiki mikukvøldið. Men í 2. hálvleiki var avrikið gott, og tað velja teir at halda fokus á.

- Spælið var gott í 2. hálvleiki, og tí avrikinum mugu vit hava fokus á, nú gøtumenn koma at vitja. Teir hava vunnið á okkum fleiri ferðir, og nú eiga vit tørn. Vónbrotið frá steypafinaluni verður vaskað burtur, um tað eydnast okkum at vinna trý stig, og tað ætla vit okkum avgjørt at gera, sigur Páll M. Joensen.

## Aftur gerandisdagur í Sundalagnum

**AB fer við góðum hugburði til Streymnesar, har steypavinnararnir fýra ferðir fyrr í ár hava snávað**

EB/STREYMUR-AB
*Jóannes Hansen*

Nú ræður um hjá EB/Streymi at venda sær hinvegin. Síðani mikukvøldið´hevur lagið verið gott og fagnaðurin stórur um, at tað fyri fyrstu ferð nakrantíð eydnaðist at vinna steypakappingina. Sagt varð, at árið er bjargað. EB/Streymur hevur sum kanska fyrsta felag yvirhøvur í Europa vunnið sær atgongumerki til UEFA Cup næsta summar.

Í kvøld og fram til sunnudagin er tað uppgávan hjá Piotr Krakowski og Sámal Eriki Hentze at fá fegnu spælararnar at goyma steypasigurin og heldur at venda eygunum móti landskappingardystinum ímóti AB.

Tá ið AB fyrr í summar vitjaði, vann EB/Streymur trivaligan sigur, men annars hevur tað ikki gingið meiri enn passaligt á heimavølli. Fýra ferðir hevur EB/Streymur kiksað á egnum vølli, har tey stigini eru mist, sum resta í fyri at vera heilt á toppinum og harvið hava møguleika at vinna FM heitið afturat Løgmanssteypinum.

Tað er greitt, at miðverjan skal umskipast, tí liðformaðurin Egil á Bø er leikbannaður.

AB hevur einki út at geva. Støðan er hættislig, og um talan ikki skal gerast um leygardagsfótbólt á Argjum næsta ár, so mugu stig og sigrar vinnast í avbjóðingum, sum á pappírinum tykjast vónleysar.

Síðsta sunnudag helt AB leingi tørn ímóti NSÍ, men so gjørdist munurin tann, sum hann oftast er á toppi og botni:

- Hugburðurin var góður, og vit stríddust væl. Vit fara at royna at halda fram við tí og vóna so, at tað fer at eydnast at fáa stig burturúr. Sum nú er hugsa vit ikki so nógv um spælið. Tað ræður um at fáa stig á kontina, sigur Hanus Jacobsen í AB.

## Dómarayvirlit

**Formuladeildin:**
B36 – VB/Sumba — Ransin Djurhuus
KÍ – B71 — Rúni Gaardbo
NSÍ – Skála — Lars Müller
EB/Streymur – AB — Miikka Lahdesmaki (FIN)
HB – GÍ — Dagfinn Olsen

**1. deild menn:**
B68 – ÍF — Høgni Hansen
B36 – HB — Dagfinn Olsen
KÍ – TB — Rói Jacobsen
NSÍ – LÍF — Andrew Christiansen
SÍ – FSV 04 — Jan Skoradal

**1. deild kvinnur:**
KÍ – NSÍ — Andreas Josephsen
GÍ – B36 — Marner Olsen
AB – EB/Streymur — Jóhan Petur Michelsen

**2. deild menn:**
EB/Streymur – GÍ — Jákup Baldvinson
Fram – B68 — Jóhan B. Dahl-Olsen
KÍ – ÍF — Berint Andreasen
FSV 04 – Skála — Andrass Weihe
B36 – MB — Rói Jacobsen